# TILTØK

**Gudstænastur**
*Mikudagin 30. nov.*
***Vestmanna kirkja:*** kl. 16.00, Eldragudstænasta, Inga Poulsen Dam

**Gudstænastur**
*2. sunnudag í advent*
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk,
***kl. 14.00*** Jónsvein Bech, deyvagudstænasta
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Heri Joensen
***Sandavágur:*** kl. 12.00, David Johannesen
***Norðskála:*** kl. 11.40, skriftamál, kl. 12.00 Messa, Emil Olsen
***Eiði:*** kl. 17.00 Ljósgudstænasta, Emil Olsen
***Haldarsvík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Kollafjørður:*** kl. 12.00 Lestur, Kristiliga sangkórið syngur
***Hósvík:*** kl. 12.00, altarg., Mogens tilsted Christensen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00 Martin R. Jacobsen. ***Ì Nes prestagjaldi gongur talvan fyri sjómanskirkjuna***
***Hvannasund:*** kl. 12.00, altarg., Elsa Funding
***Vágur:*** kl. 11.00, altarg.,
***Hov:*** kl. 12.00, Òlavur Rasmussen

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin 1. des. kl. 20.00 verður Taizé-kvøld (bønarstund v/ sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciscanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Calogero La Loggia, prestur í Mariukirkjuni. Kirkjukaffi verður aftaná. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti.

**Adventkirkjan**
Mikudagin kl. 19.30 Møti.
Evni: Skilir tú tað tú lesur?

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 11.30 steðgur við drekka.
Kl. 12.00 Tilbiðjanarmøti.
Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.00. Møti kann hoyrast á netinum www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Ì dag kl. 17.00 Bøn, kl. 19.00 Delli.
Ì morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 19.00 Chil.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómurin hittist hjá Tom Rasmussen.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Jerry O'Campo, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 hevur Eldrahugnin jólahugna.
Fríggjadagin kl. 18.30 hevur MiniSalt jólahugna.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti við Lív Jacobsen.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Tóra Slættalíð.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jóhan P. Johannesen.
Mánadagin kl. 17.15-18.15 venur barnakórið, aldur 1. fl. og eldri. Kl. 20.00 Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini. Kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Aglow, Tórshavn**
Jólafundurin verður í Oasuni í Hoyvík leygarkvøldið 3. des. kl. 19.30, allar kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin. Elisabeth Hvítklett Joensen luttekur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15.00 Bøn.
Mennirnir samlast kl. 19.00.
Hósdag kl. 20.00 Heimaforbundið - fyri allar kvinnur.
Leygardagin kl. 16.00-19.00 Jólaítriv fyri alla familjuna, har vit enda við døgurða.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti.
Mánadagin kl. 17.00 Jólahugni fyri skótar og avvarðandi.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin 4. des. kl. 18.00 Sangløta, ymiskir luttakarar. Anita og Jónhallur Debess, Petur Hermansen, Jens Lisberg og fleiri luttaka. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarfundur. Páll Poulsen talar.
Evnið: Rættvísgering.
www.hebron.fo

**Ebenezer**
Mikudag kl. 16.45 Sangvenjing, Yngra barnakórið. kl. 17.30 Sangvenjing, eldra barnakórið, kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti, Jóan Magnus Rasmussen tosar.
Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night úti á Fløtum.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
www.ebenezer.fo

**Saron, Vestmanna**
Mikukvøldið kl. 20.00 Ungdómsarbeiði.
Hóskvøldið kl. 19.00 Barnaarbeiði.
Sunnudagin 4. des. kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 1. des. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia Vágar,**
*Miðvágur*
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Missiónshúsið Libanon**
Barnakórið venur mikudagin kl. 17.00.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20.00, Tórhild Bjarkhamar verður við og greiðir frá arbeiðinum »Børn í vanda«. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Aglowmøti**
verður í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági leygarkvøldið 3. des. kl. 20.00. Snorri og Turid Brend luttaka. Kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Bíbiltími hóskvøldið kl. 20.00 við Niels J. Nielsen trb.
Evni: 1. Sámuelsbók kap. 27.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20.00 Møti við Jerry Ocampo frá Filipinunum. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 21.00 Awake við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Jerry O'campo. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Hvalvíkar missiónshús**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafjørður**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Klæmint Eliasen talar. Evni: At styrkja hin móða við orði Harrans (Esaias kap. 50). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mána-, miku- og fríggjamorgun kl. 6.00-7.00 Bøn.
Mikudagin kl. 17.30 Tim5.
Kl. 19.30 Kvøldbíbliuskúlin, kl. 20.00 Húsmøti hjá Dánjal og Annet, Saltangará.
Hósdagin kl. 17.00 Liljur.

**Aglow, Eysturoy**
Jólamøti verður fríggjakvøldið 2. des. kl. 20.00 í Bygdarhúsinum á Strondum. Kvinnur og menn hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Mikudagin kl. 6.15 Morgunbøn og kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 6.15 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.15 Morgunbøn.
Fríggja- og leygarkvøldið er Ungdómsvikuskifti í Skúlanum við ósánna.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við Jerome Ocampo.
Leygarmorgun kl. 10.00 Bøn og kl. 20.30 Ungdómsmøti við Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við André Matras og Andreas Nýggjagarð.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týskvøldið kl. 21.30 Bønarløta.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbiltími við Hilmar Danielsen 1. Kor. kap. 12 og 14.
Hósdagin kl. 19.00 Bønarløta.
Kl. 20.00 venur gospelkórið »gleðið«.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Meinigheitsmøti. Kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Møti verður sunnukvøldið 4. des. kl. 18.00 við luttøku úr Soli Deo Gloria. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti, ung vitna og syngja.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúlin hevur hugnaløtu, kl. 18.00 Møti v/ Hjálgrím Davidsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Hermon, Norðdepli**
Osvald Kjærbo talar á møtinum hóskvøldið kl. 20.00.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, 2. Kor. 8. kap.
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

**Aglow á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 19.30 Jólamøti í húsinum hjá Handverkarafelagnum. Menn og kvinnur, øll eru hjartaliga vælkomin

**Salem, Tvøroyri**
Ungdómsløta fyri 12 ár og eldri verður fríggjakvøldið kl. 20.00. Øll hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikudagin kl. 18.00 Juniormøti. Kl. 20.00 Heimaforbundsmøti. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Leygardagin kl. 21.00 Ungdómsmøti v/ ungdómi av Strondum.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti v/ Eingrím Holm, kl. 18.00 Evangel. møti við barnaansing, Eyðun Christiansen talar. Øll eru vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti og kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bíbliutími og bøn.

**Vágs Pensionistafelag**
hevur jólaveitslu á Bakkanum leygardagin 10. des. kl. 18.30. Kostnaður 100 kr. pr. lim. Tekning hjá nevndini áðrenn 8. des. Minst til jólapakkarnar. Gávur vera til lutaseðlasøluna.

**Føroysk møtir í Suðurjytlandi**
Evangeliskir fundir í hesum býnum!
***Esbjerg:*** Fríggjakvøldið 9. dec. 2005, kl. 19.30. Evangeliskur Fundur í Sæddingcenter.
***Sønderborg:*** Leygarkvøldið 10. dec. 2005, kl. 19.00 Evangeliskur fundur og Sunnudagin 11. dec. kl. 10.00 Breyðbróting. Á Søndre Landevej 28.
***Vejle:*** Sunnudagin 11. dec. 2005, kl. 16.00 Breyðbróting og kl. 17.00 verður Evangeliskur Fundur, í Salinum hjá Frelsunarherinum, í Staldgårdsgade 4. Talarar verða: Rógvi Joensen og aðrir.
Góður sangur og tónleikur, har Kvartettin "VITIN" úr Klaksvík luttekur.
Aftaná møtini, bjóða vit ein drekkamunn og drýl við føroyskum viðskera og annað gott.
***Samkoman »MALTA« Hirtshals***

**Føroyskt møti í Ålborg**
Í fríkirkjuni í Dag Hammerskjoldsgade 2 verður føroyskt møti leygarkvøldið 3.des. kl. 19.00. Poul Jóhan Djurhuus og aðrir luttaka. Eftir møti verður hugnalig samvera við drekkamunni. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sigið øðrum frá.
**Samkoman í Malta, Hirtshals**

**Jólahald í Losjuni**
Fríggjadagin 2. desember kl.17 verður jólahald í Losjuni í Havn. Egon Hansen, lærari, lesur, Joan Petur Jacobsen, spælir klaver, borðreitt verður við smurdum breyði. Øll eru vælkomin.

**Örkin, Reykjavík**
Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari vitjar Örkina 2.-5. des. Ì hesum sambandi verður hugnaløta leygarkvøldið 3. des. kl. 20.30 og møti sunnukvøldið 4. des. kl. 20.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 28. nov.*
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: Enskt á byrjunarstigi 1, Hilda Frýdal
kl. 14.00-17.00: Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart, kánus o.o. spøl.
**Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding mánadag á tlf. 316491.**
*Týsdagin 29. nov.*
kl. 10.00-11.30: Vit synga, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Føroyskt mál í søguligum høpi, Hjalmar Petersen, málfrøðingur
*Mikudagin 30. nov.*
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði, til ber at koma sum gestir.
kl. 10.00-17.00: **Hondarbeiðið, dominobinding, binding á knagum o.a.** Vegleiðing á staðnum
*Hósdagin 1. des.*
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: Enskt á byrjunarstigi 2, Àsmundur Johannesen
kl. 14.00-17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00: Boccia, Alma Poulsen
*Fríggjadagin 2. des.*
kl. 10.00-13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 10.00-12.00 Máling og tekning. (Havi tilfar við). Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-17.00 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl
***Mikudag***
Vit gera jólaprýði
***Hósdag***
Fimleikur
Hvønn dag drekka við nýbakaðum.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðuni til taks.

**50 ár**
Leygardagin 3. desember verður Jákup Reinert Hansen, sóknarprestur, ph.d., á Sandi 50 ár. Føðingardagin verður opið hús í Todnesi millum kl. 10.00 og 14.00.

Tann 7. desember verður Jógvan Nybo, Viðareiði, 50 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst fríggjadagin tann 2. desember kl. 19.30 á Viðareiði. Vinarliga sigið frá á tlf. 451093/222450 áðrenn 1. desember.

**80 ár**
Mánadagin 12. desember verður Bjarni Samuelsen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Øravík sunnudagin 11. des. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Bjarna við at koma í føðingardag vera biðin um at siga frá á tlf. 371319 innan mánadagin 5. desember.

**90 ár**
Sunnudagin 4. desember verður Olina Lervig, Lina hjá Petur á Regni, úr Leirvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í Runavík frá kl. 15.00-18.00, har høvi verður at heilsa uppá føðingardagsbarnið.